Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

## Skrivstovustarv á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya

**Søkt verður eftir skrivstovufólki at byrja 1. januar 2009 ella skjótast gjørligt.**

Fyrsta august í ár løgdu Fróðskaparsetrið, Læraraskúlin og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin saman í ein stovn, Fróðskaparsetur Føroya.

Spennandi avbjóðingar liggja í menningini av nýggja stovninum. Sum skrivstovufólk her fært tú ávirkan á menningina á fyrisitingingina á Sjúkrararøktarfrøðiskúlanum, gott samstarv við starvsfólk bæði her á skúlanum og stovninum, eins og tætt samstarv úteftir við ma. uttanhýsis lærarar og Heilsuverkið.

Journalskipanir, sum verða nýttar á Fróðskaparsetri Føroya eru Próvbókin og Info-organizer. Fíggjarskipanin er Oracle. Teldupostaskipanin er Groupwise. Góð upplæring er í samband við starvssetanina.

**Starvið fatar um:**
- vanligt skrivstovuhald, eitt nú bókhald, journal, postavgreiðslu o.a.
- at hava próvbókina um hendi
- dagføring av heimasíðuni

**Førleikar**
Vit vænta at tú hevur:
- skrivstovuútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving
- góðan málsligan kunnleika, serliga í føroyskum
- góðan telduførleika
- áhuga í útbúgvingarviðurskiftum
- góð samstarvsevni og ert fyrikomandi
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og ert málsøkin
- evni at tillaga teg til broyttar arbeiðsumstøður

**Setanartreytir**
Talan er um eitt fulltíðarstarv. Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, 3. flokkur.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum, ævisøgu (CV) og møguligum viðmælum skulu vera Fróðskaparsetrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. november 2008.

Umsóknir skulu sendast til:
Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya
Jónas Broncksgøta 25
FO-100 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til rektaran Súsonnu Mortensen, á tel. 352250 ella á teldupostbúðstaði:
susanna.m.mortensen@skulin.fo

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Bronckgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo



## GONGUTÚRAR Í ÍSLANDI

**Tilkomið fólk gongur eisini eftir Laugarvegnum til Þórsmørk**

**Tlf. 212358**
**foroyar.net**

Blái Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

## Almenn móttøka

Í sambandi við at Kafé Blákrossstovan verður 10 ár, verður skipað fyri almennari móttøku í Kongagøtu 8

**Týsdagin 4. novembur**
**frá kl. 15.00 til 18.00**

**Kafé Blákrossstovan**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG

## Til limafeløgini hjá FA

Áður fráboðaði kjakfundurin verður **leygardagin 15. november 2008**, í hølinum hjá **P/F Segloftið, Havnarlagið 36, 800 Tvøroyri**, fundurin byrjar kl. 10.00.

**Føroya Arbeiðarafelag**

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

Bergur á Reynatrøð

| | |
|---|---|
| Opið er: | Børkuvegur |
| mánadag-hósdag frá kl. 9-16 | 620 Runavík |
| fríggjadag frá kl. 9-12 | Tlf. 448480 |

## Føroya Stórlosja

Stórlosjufundur verður
**sunnudagin 2. nov. Kl. 16.00**
í Losjuni við Tinghúsvegin 18 í Tórshavn.

**Skrá:**
1.Eftir lógum felagsins.
2. Møgulig lógarbroyting.
3.Ymiskt.

Allir limir kunnu møta.

**Stórlosjuráði**

Sosialurin -har tað hendir

Heilsuskúli Føroya

## Nú er møguleiki at søkja inn á útbúgvingingarnar til heilsuhjálpara ella heilsurøktara, ið byrja í 2009

Vit uppliva ofta, at næmingar, ið byrja á heilsuútbúgvingunum siga: "Tað, ið vit læra, er nakað heilt annnað enn vit høvdu ímyndað okkum – útbúgvingin er í veruleikanum meira spennandi enn vit hildu..."

Hvat er tað, ið er so spennandi við heilsuútbúgvingunum? Vit, sum starvast á skúlanum, halda grundgevingina vera, at......

*á Heilsuskúlanum brynja vit teg menniskjansliga og heilsufakliga til at taka tær av øðrum menniskjum, ið hava eitthvørt brek, sjúku ella ellisbrek*

**Tú lærir at umhugsa:**
- samskifti við onnur menniskju
- lívsvirðir, lívsformar og mentan
- at virða sjálvsavgerðarrætt menniskjans
- hvussu samleiki hjá menniskjum skapast og mennist
- at brúka lívssøgu hins einstaka í røktini
- egnar hugburðir og persónligu menning
- týdningin av eygleiðingum í dagligdegnum
- týdningin av alheimsgerðini

**Heilsuhjálparin** hevur lærugreinirnar: Heilsulæru, handaligt fak og virksemi, náms- og sálarfrøði og samfelagslæru.

**Heilsurøktarin** hevur lærugreinirnar: Heilsulæru og sjúkrarøkt, medisinska læru, mentan og virksemi, náms- og sálarfrøði og samfelagslæru

Báðar útbúgvingarnar hava harumframt almennu lærugreinirnar føroyskt, danskt, enskt og náttúrulæru, ið stuðla undir hinar lærugreinirnar í útbúgvingunum og somuleiðis tryggjar hetta tær atgongd til víðari lesnað.

**Heilsuhjálparaútbúgvingin** byrjar í viku 3, í januar 2009: Longdin er 15 mánaðar og krøvini eru 9. flokkur og 1 ára arbeiðsroyndir ella 10. flokkur. Gevur førleikar at arbeiða innan Nærverkið, t.d. heimatænastuna, sambýlir og ellisheim.

**Heilsurøktaraútbúgvingin**, ið er yvirbygningur til heilsuhjálpara, byrjar í viku 13, í mars 2009: Longdin er 22 mánaðar og upptøkukrøvini eru heilsuhjálparaútbúgving ella onnur skúlagongd, mgl. saman við arbeiðsroyndum, ið tilsamans svara til longdina á heilsuhjálparaútbúgvingini. Gevur førleikar at arbeiða innan Nærverkið, sjúkrahúsverkið og serøkir, so sum t.d. psykiatri.

Freistin at søkja er 15. novembur 2008. Umsóknir kunnu fáast við at venda sær til Heilsuskúla Føroya, Kongabrekkan 14, 800 Tvøroyri, tlf. 363850 ella á teldupost heilsuskulin@skulin.fo

Fleiri upplýsingar kunnu fáast á www.heilsuskulin.fo, sum næmingar okkara hava gjørt saman við skúlanum.

Heilsuskúlin flytur væntandi í nýggj hølir um ársskiftið 2008/09.

**HEILSUSKÚlI FØROYA**
Kongabrekkan 14 · FO-800 Tvøroyri · Faroe Islands
Tel 363850 · Fax 372950
www.heilsuskulin.fo · heilsuskulin@skulin.fo